**Varðveita gomul filmklipp**

Vágs Sóknar Bygdasavn er farið undir at savna inn gamlar smalfilmsupptøkur úr Vági og við tilknýti til Vág.

Eigur tú gamlar filmsupptøkur, so set teg í samband við okkum, og vit fáa filmin spældan inn á DVD.Tú fær smalfilmin og eina DVD aftur, og savnið fær eitt avrit av DVD'ini.

Vágs Sóknar Bygdasavn heldur allan kostnaðin av hesum.

Verkætlanin er stuðlað av Lions Club Suðuroy.



**Vágs Sóknar Bygdasavn**
**www.vagsbygdasavn.com**

**Email: info@vagsbygdasavn.com**

# Eigur tú gamlar filmsupptøkur úr Vági?



**Vágs Sóknar Bygdasavn**
**www.vagsbygdasavn.com**

## Varðveita gomul filmklipp

Nógv fólk kring landið hava átt filmsupptøkutól rættiliga tíðliga, summi longu áðrenn 1950.

Í 1960unum var tað ikki óvanligt, at fólk áttu filmsupptøkutól. Og í 1970unum gerst tað alsamt meira vanligt.

Soleiðis hevur tað helst eisini verið her á leiðini, og eru tað uttan iva fleiri fólk í Vági, sum hava átt filmsupptøkutól longu í ‘60unum.



Flestu filmsupptøku-tólini tá vóru smalfilms-apparat, sum tóku upp á 8 mm. filmi. Seinni kom so beta-max og VHS.

Trupulleikin í dag er, at nógv ikki longur eiga framvísarar til hesar filmsupptøkur. Hartil farast filmsupp-tøkurnar eisini við árun-um.

Men nú er ein góð loysn upp á júst hendan trupulleika. Og vil Vágs Sóknar Bygdasavn hjálpa tær at tryggja tínar films-upptøkur.

**Frá smalfilm til DVD**

Vágs Sóknar Bygdasavn hevur tikið upp samstarv við danska felagið VideoPro, sum hevur drúgvar royndir við at spæla filmar frá smalfilm til DVD. Hetta er sama felag, sum hevur spælt filmar frá smalfilm til DVD í samband við verkætlanina Føroyskar Søgur I og II.

Smalfilmarnir verða sendir til VideoPro, og vit fáa smalfilmin aftur við tveimum DVD’um av filminum.

**Alt hevur okkara áhugað!**

Vit hava áhuga í øllum gomlum filmklippum úr Vági ella við tilknýti til Vág. Hetta er bæði galdandi fyri upptøkur av privatum hending-um t.d. føðingardeg-um, familjuveitslum, brúðleypum, ella av almennum tiltøkum sum t.d jóansøku, nýggjárshaldi, fótbólts- ella hondbóltsdystum, ella av vinnuligum virk-semi t.d. umborð á skipum ella til arbeiðis á landi og so fram-vegis.

**Soleiðis gert tú!**

Hevur tú smalfilmar, sum tú kundi hugsað tær at spælt yvir á DVD, so set teg í samband við okkum á tlf. 222928 ella á email: info@vagsbygdasavn.com.